Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Trygdarpolitikkur

Spurningar:

1. Hvørji málsøki koma, sambært løgmanni, undir trygdarpolitikk?
2. Koma fiskivinna, fiskivinnusamráðingar, fiskivinnusáttmálar og/ella líknandi undir trygdarpolitikk?
3. Hvat samskifti er við donsku stjórnina um uppskotið til samtyktar um trygdarpolitikk Føroya, sum ætlanin er at leggja fyri tingið í november?

Viðmerkingar:
Løgmaður sigur í ólavssøkurøðu sínari, at tað í november verður lagt uppskot fyri tingið um trygdarpolitisku mál Føroya.
Fyri at fáa meira at vita, verður hesin fyrispurningur settur

Á Løgtingi, 2. august 2022

Beinta Løwe Jacobsen